

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 02 - 2012

# Mærsk vil ikki gera nýggja avtalu um Norðsjógvin

Í heyst kunngjørdi tann nýggja stjórnin í Danmark, at hon ætlaði sær at endurskoða avtaluna við A.P. Møller-Mærsk um oljuna í Norðsjónum. Stjórnin duldi ikki fyri, at málið við at endurskoða avtaluna var, at staturin skuldi fáa meiri pengar burtur úr oljuni. Men stjórnin kann gott leggja ta ætlanina aftur í skuffuna, tí Mærsk vil ikki hava nakra broyting. -Vit duga ikki at síggja nakra orsøk til at samráðast av nýggjum um avtaluna. Avtalan uppfyllir alt, sum partarnir løgdu dent á undir samráðingunum í 2003, og tær samráðingarnar vóru bæði drúgvar og neyvar, sigur Anders Würtzen, leiðari fyri public affairs hjá A.P. Møller-Mærsk, við Jyllandspostin. Í viðurskiftunum við statin umboðar Mærsk Dansk Undergrunds Consortium, sum millum annað umfatar Chevron og Shell. Fyri stuttum avdúkaði Jyllandsposturin, at tey trý feløgini forvunnu tilsamans 88 milliardir krónur burtur úr oljuni og gassinum í tí danska partinum av Norðsjónum í árunum frá 2004 til 2010, og at hetta var burtur av einum umsetningi upp á 150 milliardir krónur. Thor Möger Pedersen, skattamálaráðharri, vil ikki siga, um tað kann koma upp á tal at noyða Mærsk til samráðingarborðið. Hann sigur við Jyllandspostin, at stjórnin er ikki liðug við fyrireikingarnar enn, og at ein frágreiðing skal orðast fyrst. Mærsk sigur fyri blaðnum, at felagið hevur ikki havt samband við stjórnina um ætlanina at endurskoða avtaluna um Norðsjógvin.